Dráttur–Fossánes 3–0 (25–13, 25–9, 25–15)

# Dráttur føroyameistari




*Tað ráddi um at hava tamarhald á nervunum, og tað høvdu tær hjá Drátti, tá tær ognaðu sær fyrstu kvinnumeistaraskapin, sum ikki endaði í Havn ella Klaksvík*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Vágagenturnar høvdu tamarhald á nervunum í seinasta dystinum, og eftir 3-0 sigurin var greitt, at Dráttur er meistari í kvinnuflogbólti**

FLOGBÓLTUR, KVINNUR

Síðani 10. februar hevur Dráttur sitið við bestu kortunum í dystinum um føroya-meistaraheitið í kvinnuflogbólti 2001.

Men treytirnar hava verið beinharðar: hvør tann einasti dystur skuldi vinnast 3-0, tí ella kundi roknast við, at Mjølnir streyk avstað við FM-heitinum.

### Staðið nógv á

Stundum hevur staðið nógv á vágaliðnum hesa tíðina, t.d. móti ÍF fyri trimum vikum síðani, og móti TB fyri tveimum vikum síðani, tá Dráttur við bit og slit fekk teir kravdu 3-0 sigrarnar í hús. Men tað gekk, og í dag kundi Dráttur vinna føroyameistaraskapin, vunnu tær dystin móti Fossánesi 3-0. - Hendan setningin greiddu Drátturkvinnurnar til lítar, og tunga okið sum hevur ligið á herðum leikarana varð tikið av, og armarnir hevjaðir upp í loft í fullsettu høllini á Giljanesi, nú vágagenturnar endiliga kundu kalla seg føroyameistarar.

Í samrøðu við Útvarp Føroya, segði Elisabeth Rasmussen hjá Drátti, at tær hava havt eitt sera gott lið í ár, við sera góðum álopsleikarum. Hon nevndi eisini at nógvir ungir leikarar eru í felagnum, sum fara at gera um seg í framtíðini, so framtíðarvánirnar eru sera góðar. Hon helt eisini sjálv, at Mjølnir er betri í ár, enn tær vóru í fjør, men at Dráttur kortini var tað betra liðið í ár

### Samanumtikið

Kappingin hjá kvinnunum hevur í ár verið sera spennandi. - Tey bæði Dráttur og Mjølnir vístu seg skjótt at vera í serflokki. Í fyrstu styrkiroyndini sum var, FK kappingin, vann Dráttur 3-1 á Mjølni í finaluni, so her vóru ábendingar um, at Dráttur av álvara ætlaði sær okkurt í ár.

Tvær vikur seinri var so fyrsti landskappingardysturin teirra millum. Hann vann Mjølnir 3-2. Dráttur førdi annars 2-0, men so skrædnaði, og Mjølnir vann næstu settini uttan hóvasták.

Tríggjar vikur seinri møttust Dráttur og Mjølnir á øðrum sinni í landskappingini. Her vann Dráttur 3-1, og hesin 3-1 sigurin skuldi seinri vísa seg at verða gull verdur.

Hini liðini í kappingini formáddu ikki at taka nakað stig frá Drátti og Mjølni, so tað var í innanhýsis dystunum, at avgerandi fyrimunirnir skuldu vinnast.

### Gullroykur í Klaksvík

28. januar var aftur dystur millum Drátt og Mjølnir. Hesaferð átti Mjølnir tørn at vinna. 3-2 var úrslitið, og yvirskriftin í umrøðu av dystinum var »Gullroykur í Klaksvík!«

Men enn vóru ikki allar súðir siftar. Ein dystur var eftir millum Drátt og Mjølnir og 10. februar skuldi endaliga slagið standa í Klaksvík. Hetta gjørdist eitt satt brak av einum dysti, har liðini skiftust um at liggja á odda. Men endin varð, at Dráttur vann dystin 3-2 og nú vóru tað knappliga tær ið sótu við trumfinum í hondini.

### Vinna restina

Tí nú vóru liðini púra jøvn í stigum og settmunurin var eisini hin sami. Tískil vórðu tað nú innanhýsis dystirnir, sum avgjørdu føroyameistaraskapin. Og her var Dráttur 1 sett betri enn Mjølnir.

Arbeiðssetningurin hjá Drátti var hereftir sera einfaldur, umenn harður: “Vinna tit restina av dystunum 3-0, so eru tit føroyameistarar!”

Henda setning greiddu tær, sum vit vita, til lítar og Dráttur er nú Føroyameistari!

Sosialurin ynskir Drátti hjartaliga til lukku við føroyameistaraheitinum.

---

TB–ÍF 3–0 (25–15, 25–21, 25–15)

# TB vann bronsudystin

**TB vann sannførandi á ÍF í seinasta landskappingardystinum, og tryggjaðu tvøràgentur sær sostatt bronsumerkini**

MEISTARADEILD KVINNUR

Seinasti dysturin hjá kvinnunum var leiktur á Tvøroyri sunnudagin. ÍF og TB skuldu gera av, hvør av teimum skuldi hava bronsuna.

Hesi bæði liðini hava leikt nógvar javnar og spennandi dystir hetta kappingarárið, men hesin seinasti var ikki ein av teimum mest spennandi. TB hevði sett sær fyri at fáa fatur á bronsuni, og dámurnar av Tvøroyri lótu ongantíð ÍF koma inn í dystin. TB spældi ein av sínum bestu dystum. Alt lá væl fyri, og allan dystin megnaði TB at halda góða spælið gangandi.

### Nøgdur við árið

Virgar Djurhuus venjari í TB er rættiliga væl nøgdur við árið. Vit høvdu ongan møguleika at hótta Drátt og Mjølnir. Í eina dystinum ímóti Drátti taptu vit 3-2, og tá haldi eg, at vit høvdu ikki eydnuna við okkum, men annars var munurin ov stórur. Vit hava mist nøkur stig ímóti m.a. ÍF, sum eg haldi vit skuldu havt tikið, men alt í alt er bronsan tað, vit kundu megnað hetta kappingarárið. Okkara spæl hevur verið ov óstøðugt, og tað hevur kostað í nøkrum dystum, men í dag vístu vit okkara bestu síðu, so tað var ikki so galin endi.

Fleyr–Mjølnir 0–3

# Mjølnir silvur

**Kvinnurnar hjá Mjølni greiddu sína skyldu við at vinna 3-0 á Fleyr, men nóg mikið til gullmerkini var hetta tó ikki**

FLOGBÓLTUR, KVINNUR

Kravið til Mjølnir leygardagin var greitt — ein 3-0 sigur skuldi til, um nøkur vón skuldi vera at vinna gullið.

Og hetta krav varð uppfylt.

Fleyr hevur í ár ikki givið Mjølni ta stórvegis mótstøðuna, men leygardagin noyddu tær tó Mjølnir at taka eitt time-out í fyrsta setti, men restina av dystinum var tað tó Mjølnir sum var við yvirlutan.

Tær vunnu 3-0, og nú var bara at bíða eftir, til dysturin í Vágunum millum Drátt og Fossanes skuldi enda, tí hesin var byrjaður hálvan tíma seinni.

### Ringdu ofta

Mjølnirleikararnir vóru títtar í fartelefonini, og spenningurin var í hæddini eitt skifti í triðja setti, tá støðan í Vágunum var 13-14, men endin var, sum tað framgongur aðrastaðni, at Dráttur vann 3-0, og harvið endaðu steypavinnararnir í ár og Føroyameistararnir frá seinasta ári á silvurplássinum.

Sosialurin ynskir Mjølnir tillukkur við silvurinum.




*Hóast tryggan sigur í seinasta dystinum, so vunnu tær hjá Mjølni ikki upp uim Drátt*



# Fram og Fleyr góðan enda



*Hóast tað ikki eydnaðist teimum at vinna seinasta dystin, so vóru fuglfirðingar glaðir, tá teir endiliga hvødu fingið FM-steypin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Tað vóru tey bæði havnarliðini, sum endaðu árið best, men stóri vinnarin var hóast alt ÍF, meðan Mjølnir gjørdust stóru tapararnir**

FLOGBÓLTUR, MEISTARADEILD MENN

Landskappingin hjá teimum vaksnu er nú av. Onkrir upp- og niðurflytingardystir skulu avgreiðast, men annars er alt avgjørt. Undan hesum leikumfarinum var longu greitt, at ÍF var føroyameistari, men silvurið og bronsan vóru framvegis eftir at stríðast um.

Í Eysturskúlanum kundi Fram tryggja sær silvurið, um teir vunnu á ÍF. Fram hevði tí avgjørt meira at spæla um enn ÍF, og tað sást skjótt, at Fram ætlaði sær silvurið. Hjá ÍF manglaði Bartal Eliasen á kantinum, men annars var liðið fullmannað.

Fram spældi við fullari styrki, og eftir knappan tíma høvdu teir vunnið 3-0 á føroyameistarunum ÍF. Tað var so plástur á sárið, ikki at gerast nr. 1, men spell var tað fyri dystin, at ikki bæði liðini høvdu eins nógv at spæla fyri.

### Bronsustríðið

Fleyr tók ímóti Mjølni í Gundadalshøllini. At Mjølnirliðið er í kreppu er tað helst eingin, ið ivast í longur. Eins og í dystinum seinasta vikuskifti ímóti ÍF, so lá væl fyri hjá Mjølni í 1. setti. Tað gav tí vón fyri sigrinum, men tað var sum um, at krútið var uppi eftir hetta. Eftir trilvandi byrjan fekk Fleyr fullkomið tak á dystinum, og við góðum og tryggum spæli eydnaðist at vinna 3 tey næstu settini sannførandi. Tað er júst misjavnt spæl, sum hevur eyðkent Fleyr hetta kappingarárið. Tá ið spælið hevur gingið væl, hava teir vunnið dystirnar, men ov ofta hevur spælið ikki verið nóg gott.

### Samanumtikið

Fyrst í kappingarárinum var tað Fram, sum steyk avstað, men tað fekk bráðan enda og fleiri tap á rað høvdu við sær, at serliga Mjølnir tók seg langt fram. Í steðginum var tað tí Mjølnir, sum lá best fyri, og nógv bendi á, at gullið var á veg ”heim” aftur. ÍF hevði tó stóra framgongd í fyrru hálvu, og teir tóktust at fara at vera harðasti kappingarneytin hjá Mjølni. Fleyr var ikki rættiliga til at rokna út, men í steðginum lógu teir soleiðis fyri, at teir framvegis kundu vinna. Bara SÍ var fokið í FM stríðnum.

Eftir jólasteðgin helt Mjølnir á við góða spælinum, og teir vunnu m.a. á Fram, so at havnamenninir vóru settir til viks í FM-stríðnum, í hvussu er eina tíð. Men so kom steðgur í. Mjølnir spældi tveir harðar dystir sama vikuskifti, og tað hevði við sær ógvusligar avleiðingar. Fyrst fingu teir bank í Klaksvík, tá ið Fleyr var á vitjan. Dagin eftir skuldi gongdin vendast í torførum útidysti ímóti ÍF. Hetta gjørdist ein sannur toppdystur, sum fekk ógvuliga dramatiskan enda. Leikararnir í Mjølni hildu, at dømingarnar gingu í hvussu er ikki teirra veg, og endin var, at ÍF fór avstað við sigrinum 3-2. Tað var tungt hjá Mjølni at taka, og eftir hetta vildi einki bera til hjá klaksvíksliðnum, sum nú, tá ið gjørt varð upp, als ikki fingu heiðustmerki.

Fram lá og lúrdi, men dysturin ímóti ÍF á Kambsdali, sum endaði 3-2 til ÍF, fekk í seinasta enda stóran týdning. Hevði Fram havt vunnið tann dystin so…

ÍF var besta liðið hetta kappingarárið. Teir vunnu teir týdningarmiklastu dystirnar, og sum nógvir føroyingar sóu, tá ið steypafinalan varð leikt, so er ÍF mannað við sera góðum leikarum. Á liðnum eru leikarar við nógvum royndum, og ungir menn koma sær eisini framat. Venjarin Boban Ilic hevur givið liðnum nógv, bæði tí hann sjálvur er sera góður, og tí hann eftir øllum at døma eisini roynist sum venjari. Alt í alt gjørdist ÍF stóri vinnarin og Mjølnir stóri taparin. Vit ynskja ÍF til lukku við føroyameistaraskapinum og ynskja Mjølni betri eydnu næstu ferð.

### Støðan, Meistaradeild Menn

| Støðan | | Dystir | | | Sett | | * |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | vunnir | taptir | vunnin | tapt | munur | Stig |
| ÍF | 16 | 11 | 5 | 37 | 24 | 13 | 17 |
| Fram | 16 | 10 | 6 | 38 | 25 | 13 | 16 |
| Fleyr | 16 | 9 | 7 | 31 | 26 | 5 | 14 |
| Mjølnir | 16 | 10 | 6 | 38 | 24 | 14 | 13 |
| SÍ | 16 | 0 | 16 | 3 | 48 | -45 | 0 |

### Støðan, Meistaradeild Kvinnur

| Støðan | | Dystir | | | Sett | | * |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | vunnir | taptir | vunnin | tapt | munur | Stig |
| Dráttur | 20 | 18 | 2 | 58 | 13 | 45 | 27 |
| Mjølnir | 20 | 18 | 2 | 57 | 12 | 45 | 27 |
| TB | 20 | 9 | 11 | 39 | 34 | 5 | 14 |
| ÍF | 20 | 8 | 12 | 27 | 42 | -15 | 13 |
| Fleyr | 20 | 6 | 14 | 21 | 48 | -27 | 7 |
| Fossánes | 20 | 1 | 19 | 5 | 58 | -53 | 2 |

### Støðan, 1. Deild Menn

| Støðan | | Dystir | | | Sett | | * |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | vunnir | taptir | vunnin | tapt | munur | Stig |
| ÍF | 12 | 9 | 3 | 31 | 12 | 19 | 18 |
| Fleyr | 12 | 8 | 4 | 27 | 21 | 6 | 16 |
| Mjølnir b | 12 | 7 | 5 | 26 | 19 | 7 | 14 |
| Nøvan | 12 | 7 | 5 | 23 | 21 | 2 | 14 |
| Mjølnir a | 12 | 6 | 6 | 22 | 22 | 0 | 12 |
| SÍ | 12 | 3 | 9 | 14 | 28 | -14 | 6 |
| NFL | 12 | 1 | 10 | 12 | 32 | -20 | 4 |

### Støðan, 1. Deild Kvinnur

| Støðan | | Dystir | | | Sett | | * |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | vunnir | taptir | vunnin | tapt | munur | Stig |
| Fleyr | 10 | 8 | 2 | 27 | 10 | 17 | 16 |
| KÍF | 10 | 6 | 4 | 22 | 16 | 6 | 12 |
| Dráttur | 10 | 6 | 4 | 21 | 18 | 3 | 12 |
| Nøvan | 10 | 6 | 4 | 20 | 16 | 4 | 12 |
| SÍ | 10 | 3 | 7 | 14 | 22 | -8 | 6 |
| Mjølnir | 10 | 1 | 9 | 6 | 28 | -22 | 2 |

### Støðan, 2. Deild Menn

| Støðan | | Dystir | | | Sett | | * |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | vunnir | taptir | vunnin | tapt | munur | Stig |
| ÍF | 8 | 6 | 2 | 20 | 10 | 10 | 12 |
| Nøvan | 8 | 5 | 3 | 19 | 13 | 6 | 10 |
| SÍ | 8 | 1 | 7 | 5 | 17 | -16 | 2 |

### Støðan, 2. Deild Kvinnur

| Støðan | | Dystir | | | Sett | | * |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | vunnir | taptir | vunnin | tapt | munur | Stig |
| TB | 14 | 13 | 1 | 40 | 5 | 35 | 26 |
| Mjølnir a | 14 | 12 | 2 | 38 | 14 | 24 | 24 |
| KÍF | 14 | 10 | 4 | 33 | 17 | 16 | 20 |
| Fleyr | 14 | 8 | 6 | 30 | 22 | 8 | 16 |
| ÍF | 14 | 5 | 9 | 20 | 29 | -9 | 10 |
| Nøvan | 14 | 4 | 9 | 21 | 28 | -7 | 10 |
| SÍ | 14 | 3 | 11 | 10 | 35 | -25 | 6 |
| Fossánes | 14 | 0 | 14 | 0 | 42 | -42 | 0 |

### Støðan, Dreingir 16

| Støðan | | Dystir | | | Sett | | * |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | vunnir | taptir | vunnin | tapt | munur | Stig |
| SÍ | 9 | 7 | 2 | 21 | 8 | 13 | 14 |
| Fleyr | 9 | 7 | 2 | 23 | 10 | 13 | 14 |
| TB | 9 | 3 | 6 | 11 | 18 | -7 | 6 |
| ÍF | 9 | 1 | 8 | 5 | 24 | -19 | 2 |

### Støðan, Gentur 16

| Støðan | | Dystir | | | Sett | | * |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | vunnir | taptir | vunnin | tapt | munur | Stig |
| KÍF | 10 | 9 | 1 | 29 | 4 | 25 | 18 |
| TB | 10 | 8 | 2 | 26 | 8 | 18 | 16 |
| Dráttur a | 10 | 7 | 3 | 22 | 11 | 11 | 14 |
| Fleyr | 10 | 3 | 7 | 9 | 23 | -14 | 6 |
| Dráttur b | 10 | 2 | 8 | 10 | 24 | -14 | 4 |
| ÍF | 10 | 1 | 9 | 3 | 29 | -26 | 2 |